# Fann ikki heimaftur



*Bæði Tjaldrið og Triton - við tyrluni - vóru og leitaðu sunnumorgunin*
*Savnsmynd*

**Ólavsøkumorgun leitaðu verjuskip og tyrla eftir einum báti, sum hevði boðað Tórshavn Radio frá, at hann fann ikki til hús aftur**

LEITING
*Edvard Joensen*

Tíðliga sunnumorgunin boðaði Tórshavn Radio Marinustøðini og Vaktar- & Bjargingartænastuni frá, at ein bátur rópti á kanal 16 og segði, at hann visti ikki, hvar hann var staddur.

Tjaldrið og Triton fóru beinanveg at royna at peila seg fram til bátin, eins og tyrlan hjá Triton fór á flog.

Komið varð eftir, at báturin helst var staddur sunnanvert Tindhólm ella har á leið.

Tað vísti seg eisini at passa, og tyrlan fann bátin suður úr Tindhólmi. Umframt at hann ikki visti at siga, hvar hann var staddur, var báturin eisini uppsteðgaður, tá hann var funnin. Veðrið var tá longu øtlað nakað, um enn tað ikki varð vorðið til tað illveðrið, tað seinni gjørdist, verður sagt av Marinustøðini.

Ein einsamallur maðuri var í bátinum, sum var farin av Sørvági leygarkvøldið.

Báturin varð sleipaður á Sørvág, har løgreglan stóð fyri honum, upplýsir Eli Lyngvej Larsen, pressuoffiserur á Færøernes Kommando.

Tá Sosialurin tosaði við Færøernes Kommand beint fyri evstamark í gjár, var ikki greitt, um løgreglan fór at gera nakað meira við málið, segði Eli Lyngvej Larsen. Og hvørki vakthavandi á politistøðini í Vágum ella í Havn visti at siga nakað um, hvørt nakað meira fór at henda.

Tað kann lættliga gerast ein dýr søga, um neyðugt verður at leita eftir fólki orsakað av ólíkindum.

Eli Lyngvej Larsen, pressuoffiserur á Færøernes Kommando, sigur, at um so er, at løgreglan fer at reisa eitt politimál fyri eitthvørt óregluligt í samband við slíka sigling og leiting sum hesa sunnumorgunin, er ikki óhugsandi, at Færøernes Kommando eisini fer at senda rokning fyri tyrluflúgving.

Og tað kann skjótt gerast ein dýrur túrur. Tí tyrlan var á flogi í ein tíma og eitt korter hendan morgunin, og hvør flogtími kostar 29.000,- krónur, verður sagt av Færøernes Kommando.

# Nokta at gjalda fyri fjarhita

**Fólk, ið fáa hita frá Fjarhitafelagnum, nokta nú at gjalda rokningarnar, tí tey eru misnøgd við príspolitikkin hjá felagnum**

FJARHITI
*Eyðun Klakstein*

Stríðið millum Fjarhitafelagið í Havn og brúkararnar av fjarhitanum eru nú harnað aftur.

Nú nokta fleiri brúkarar fyri at gjalda rokningarnar, sum koma frá Fjarhitafelagnum, og summi vilja ikki gjalda meirkostanðin, sum er komin í ár.

Ein av teimum, sum nú hevur steðgað gjaldingini fyri fjarhitan, er Suni Poulsen, sum eisini er í serligu fjarhitanevndini hjá Eigarafeløgunum í Hoyvík.

– Eg havi steðgað gjaldingini til Fjarhitafelagið, tí eg eri so misnøgdur við teirra príspolitikk, sigur Suni Poulsen.

– Vit hava stríðst við Fjarhitafelagið í fýra ár, men vit eru ongan veg komin, og tí mugu vit gera vart við okkum á hendan hátt, sigur hann.

## Gamalt stríð

Stríðið millum Fjarhitafelagið og tey, sum brúka fjarhitan, er fleiri ára gamalt.

Tá fólk fóru í húsini í býlingunum í Hoyvík fingu tey fjarhita ístaðinfyri oljufýr. Tórshavnar kommuna lovaði tá, at fjarhitin ongantíð skuldi verða dýrari enn oljan.

Brúkararnir av fjarhita halda, at teir gjalda meiri fyri fjarhitan, enn onnur gjalda fyri oljuna, og hetta hava tey víst á í útrokningum, sum tey hava gjørt.

Nevndin í Fjarhitafelagnum hevur svarað hesum útrokningum við at siga, at prísurin hjá teimum er í lagi.

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum vil hava eina óhefta kanning av prísinum hjá Fjarhitafelagnum, men hesa kanning hava tey ikki fingið enn.



*Stríðið um fjarhitaprísin heldur fram, og nú nokta brúkarar at gjalda rokningar frá Fjarhitafelagnum*

## Nevndin tekur málið upp

Nýggj nevnd er vald fyri Fjarhitafelagð, og formaðurin í nevndini, Kristian Fríðrík Olsen, sum umboðar SEV, segði fríggjadagin við Útvarpið, at nevndin í Fjarhitafelagnum fer at viðgera spurningin um eina kanning av prísinum.

Hann vildi ikki lova, at ein kanning verður gjørd, men nevndin fer at taka málið upp.

Ímeðan heldur stríðið millum Fjarhitafelagið og brúkararnar fram, og nú brúkarar eru givnir at gjalda fyri fjarhitan er líkt til, at ein kanning helst verður gjørd av prísinum.

Nýggja nevndin í Fjarhitafelagnum skal hava fund miðskeiðis í august mánaði.





# Hugmóð at rokna við olju í summar

**- Tað kann vera hugmóð at rokna við, at olja verður funnin í summar. Talan kann gerast um oljuleitingar heldur enn um oljuframleiðslu í mong ár enn segði løgmaður m.a. í síni røðu á ólavsøku**

LØGMANSRØÐA
*Jan Müller*

Hvørt ár á ólavsøku heldur løgmaður eina røðu til alla tjóðina. Hon er ein gjøgnumgongd av útviklinginum seinasta árið/árini og ein meting av framtíðini. Ikki var so nógv nýtt í røðuni hesaferð, sum mest var ein uppreksan av gongdini hesi seinastu trý árini samgongan hevur sitið.

Hann nevndi tó, at tað er nakað serligt at umøða oljumál júst á hesi ólavsøkuni. Vísti, á at fyrsti borurin varð settur í føroysku undirgrundina fyri umleið trimum vikum síðani. Og í hesi vikuni byrjaði tann næsta boringin. Gongur eftir ætlan skal triði brunnurin á føroyska landgrunninum borast í september.

Løgmaður vísti á tær nógvu og drúgvu fyrireikingarnar, sum eru gjørdar seinastu árini. Lógir eru smíðaðar, ið seta neyvar karmar fyri virksemið, fyrisitingin er skipað, umhvørviskanningar eru gjørdar og tilbúgvingarviðurskiftini eru fingin í rætt lag. -Virksemið er nú byrjað í tí sannføring, at øll neyðug stig eru tikin til tess at tryggja, at oljuleitingin fer fram á ein tryggan og umhvørvisvinarligan hátt segði løgmaður og helt fram:

- Nú verður bíðað í spenningi eftir fyrstu úrslitunum, sum verða tøk um fáar vikur. Verður rakt við olju í summar standa nógvir stórir spurningar fyri framman. Er talan um nøgdir, ið gera oljuleitingina rakstrarverduga? Hvussu skal oljan takast upp? Eigur oljan at verða tikin í land í Føroyum? Og hvørji verða árinini á mentan, búskap, fiskivinnu og samfelagið annars spurdi løgmaður og segði, at hetta alt eru viðkomandi spurningar, sum landsstýrið arbeiðir við og sum størri dentur fer at verða lagdur á, um tað í heyst gerst neyðugt at ætla um hesi viðurskifti.

- Um kolvetni í framleiðsluverdum nøgdum verður funnið á føroyska landgrunninum fer tað at føra til broytingar í føroyska samfelagnum – men neyðturvuliga ikki til tað verra. Tað er skyldan hjá myndugleikunum at byrgja upp fyri, at ávirkanin endar við at avskepla okkara mál, mentan og samfelag.

Vit eiga tó hvørki at stúra óneyðugt ella kanna okkum bitan ov tíðliga segði løgmaður og vísti á, at boringarnar, sum nú fara fram á landgrunninum, eru tær fyrstu í eini røð, og komandi árini verða fleiri brunnar boraðir. -Í okkara grannalondum eru oftast boraðir heilt nógvir brunnar áðrenn fyrsta veruliga oljuleiðin verður funnin. Tí kann tað tykjast sum hugmóð at rokna við, at olja verður funnin í summar. Og vit eiga at gera okkum greitt, at talan kann gerast um oljuleitingar heldur enn um oljuframleiðslu í mong ár enn.

Fyrireikingarnar til oljuleiting hava longu víst seg at føra til eina munardygga dygdarmenning í føroyska vinnulívinum, sum styrkir okkum í altjóða kappingini og gevur neyðugan førleika at vinna sær nýggjar marknaðir.

# Tjóvstarturin á ólavsøku

**Fleiri túsund fólk byrjaðu ólavsøkuna longu fríggjakvøldið við at fara í konsert í Kommunuskúlagarðinum**

ÓLAVSØKUKONSERT
*Rúnar Reistrup*

Tá klokkan leið út ímóti trý leygarmorgunin og Frændur sendu teir seinastu tónarnar út ígjøgnum hátalararnar, var Kommunuskúlagarðurin pakkaður av fólki, og fyriskiparin, Føroya Undirhaldstónleikarafelag, kundi hyggja aftur á enn eina sera væleydnaða ólavsøkukonsert.

Konsertin legði spakuliga frá landi við teimum meira friðarligu bólkunum og lætti so av álvara tá klokkan leið ímóti midnátt, og fólk møttu upp at hoyra teir harðaru bólkarnar.



*MC-Hár høvdu hesaferð nakin donsk konufólk við á pallinum. Kropparnir vóru málaðir við føroysku litunum*
*Mynd: Jens K. Vang*

MC-Hár reis upp úr gloymibókini aftur, og við góðari hjálp frá Terja Rasmussen, Róki Jacobsen og tveimum livandi føroyskum fløggum fekk hárbólkurin øgiligt lív í áhoyrarafjøldina.

Terji Rasmussen, sum ikki hevur verið so konsertaktuellur seinnu árini var aftur á pallinum seinni um kvøldið, hesuferð við Frændum, sum eins og í fjør fingu heiðurin at enda konsertina við einari nakað longri framførslu enn hinir bólkarnir.

Hetta hóvaði áhoyrarunum. Fremst stóðu fólk í trunka og skumpaðust og hoppaðu og sungu við av hjartans lyst. Aftanfyri trunkan varð dansað og heilt har afturi stóðu fólk friðarliga og lurtaðu.

Regnið, sum summir av veðurmonnunum høvdu hótt við frammundan, kom ikki kortini undir konsertini. Onkuntíð sirmaði, men ongantíð so nógv at tað rak fólk inn undir skjól, men hjá nógvum bleiv sum vera man eitt sindur váttligt kortini.

Les ummæli av Ólavsøkukonsertini í Sosialinum í morgin.

PRÝÐISLUTIR
VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI




Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi røð av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 2 motiv - fleri eru at velja ímillum.

Prýðislutirnir verða latnir í gávueskju við fittligum bókling um hvønn einstakan prýðislut.

Eitt frálíkt **gávuhugskot** - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...

3arin

SMS - Tel. 353535 · Fax 353536 · www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com